

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 11 - 2011

# Libya aftur á oljumarknaðin um eitt ár

Nú borgarakríggið í Libya er av, royna myndugleikarnir at byggja oljuídnaðin uppaftur, og sambært Opec kemur libyska oljuframleiðslan aftur á sama støði sum í 2010 innan 15 mánaðir. Libya hevur bara tvey prosent av heimsins oljuframleiðslu, men landið hevur stóran týdning fyri heimsmarknaðin, tí landið útflytir 85 prosent av sínari framleiðslu. Til 1. mars í ár var tann dagliga framleiðslan 1,6 millión tunnur, men framleiðslan steðgaði, tí uppreisturin noyddi feløgini at senda teir útlendsku oljuarbeiðsmenninar heim. Undir Gaddafi-stýrinum var tað tað almenna felagið National Oil Company, sum formliga stóð fyri oljuídnaðinum, meðan ein røð av útlendskum feløgum stóðu fyri rakstrinum. Millum feløgini, sum vóru serliga virkin í Libya, vóru Eni, Total, BP, Repsol, ExxonMobil, Chevron, Occidental Petroleum, Hess og ConocoPhillips. Men ta seinastu tíðina komu kinesararnir uppí, og tá borgarakríggið byrjaði í vár, hevði kinesiska felagið China National Petroleum Corp (CNPC) umleið 400 fólk í arbeiði í Libya. Eftir øllum at døma sleppa "tey gomlu" feløgini aftur til arbeiðis í Libya, nú oljuvinnan skal byggjast uppaftur. Í hvussu er hevur formaðurin í skiftisráðnum, Mustafa Abdel Jalil, sagt, at feløgini, sum vóru virkin undan krígnum, sleppa aftur framat.